Hanna D. Andreassen

Fra: Jákup Holm Johannesen <international@mfs.fo>
Sendt: Wednesday, January 31, 2024 19:09
Til: Barna- og Útbúgvingar Málaráðið
Emne: Hoyringsskriv í samband við løgtinglóg um føroyskan føreikakarm

Vit í Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) vilja vísa sterkan stuðul til uppskotið um føroyskan førleikakarm. MFS hevur fylgt væl við tilgongdini í uppskotinum og eru tí sera fegin at síggja ein samlaðan førleikakarm fyri Føroyar, sum uttan iva kemur at styrkja og menna hægri útbúgving í Føroyum. Verður uppskotið góðtikið, er tað ein stórur sigur fyri øll føroysk lesandi. Hægri útbúgving er tá eisini eitt fet nærri einum av høvuðsmálum hjá MFS á altjóða støði sum er Bologna og Erasmus+. Tað kann skapa eina ørgrynnu av virði fyri hægri útbúgving og Føroyar.
Tískil eru MFS sera fegin og veita fullan stuðul til uppskotið.

Meginfelag Føroyskra Studenta